# Ráðharri vil ikki sløkkja

Norðurírski umhvørvismálaáðharrin, Sammy Wilson, er av sonnum komin í andglettin, tí hann hevur steðgað einum átaki, sum skuldi gagna veðurlagnum. Í átakinum varð millum annað heitt á fólk um at sløkkja ljósið, tá tey fóru úr einum rúmi, men tað heldur ráðharrin vera tvætl. Sammy Wilson er av teirri áskoðan, at tað er ikki menniskjan, sum hevur elvt til veksandi hita á jørðini, og tí hevur tað ongan týdning fyri umhvørvið, at fólk spara streym, sigur hann. Andstøðan vil hava Sammy Wilson frá.



# Dalai Lama til Íslands

Dalai Lama, sum er andaligur og verðsligur leiðari hjá fólkinum í Tibet, fer til Íslands í summar. Tey seinastu 50 árini hevur Dalai Lama ferðast um allan heimin, men hetta er fyrstu ferð, at hann vitjar Ísland, skrivar Vísir. Undir vitjanini, sum verður fyrst í juni, skal tibetanski leiðarin halda fyrilestur í Laugardalshøllini í Reykjavík um ymsar viðkomandi spurningar. Dalai Lama, sum er 73 ára gamal, hevur búð í útlegd síðani 1959. Hann hevur fingið friðarheiðursløn Nobels.



*Kjartan Hansen er í løtuni undir sjónleikaraútbúgving í Svøríki. Hann varð í gjár heiðraður við gávugóðsi úr Grunni Thorvalds av Steinum, sum hann ætlar skal nýtast til listarligt arbeiði innan sjónleik*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Kjartan fekk góðsið

**Gávugóðs úr Grunni Thorvalds av Steinum varð í gjár handað sjónleikaranum, høvundinum og vísusangaranum, Kjartan Hansen**

LIST OG MENTAN
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Kjartan Hansen úr Havn varð í gjár 60.000 krónur ríkari. Hann varð á móttøku í hølunum hjá Fróðskaparsetri Føroya heiðraður við gávugóðsi úr Grunni Thorvalds av Steinum, og er hann sostatt 13. listafólki at móttaka góðs úr grunninum, hesi níggju árini, góðs hevur verið latið.

26 ára gamli Kjartan Hansen er í løtuni undir útbúgving til sjónleikara í Luleå í Norðursvøríki, og hevur hann frammanundan tikið tvey skeið á fólkaháskúlanum í Kungälv, stutt uttan fyri Göteborg. Fyrst á sjónleikaralinjuni, og síðan á vísusangaralinjuni. Seinastu nógvu árini hevur hann verið virkin innan fleiri ymiskar listagreinar. Sum sjónleikari umvegis Sjónleikarahúsið í Havn, og sum ein triðingur av leikbólkinum, Willieboys, sum yrkjari og sum høvundur, har hann millum annað hevur verið umboðaður í tíðarritinum, Vencil.



– Vit hava brúk fyri fólki, sum tær, segði formaðurin í nevndini fyri grunnin, Jóan Pauli Joensen. Tað er ein æra fyri okkum at heiðra slík listafólk áðrenn tey gera alt ov sjónsk í samfelagnum.

Nevndin ivaðist ikki í, at Kjartan Hansen fer at koma langt við sínum gávum sum sjónleikari.

### Góðsið nýtast til listarligt arbeiði

Sjálvur var Kjartan Hansen bilsin yvir heiðurin, og tók hann ímóti kekkinum og heiðursbrævinum í eyðmýkt. Í løtuni er hann í starvsvenjing í Malmö, har hann um fáar vikur skal hava frumframførslu. Hann setti sær kortini tíð av til at flúgva heim til Føroya at taka ímóti gávugóðsinum.

Hvat peningurin skal nýtast til, hevur Kjartan Hansen gjørt sær nakrar tankar um.

– Eg gangi og hugsi um tvey ting, eg kundi hugsað mær arbeitt við. Eg kundi hugsað mær at arbeitt við verkætlan, sum tvørfakliga savnar ung listafólk. Møguliga eitt tiltak, ið fevnir um fleiri dagar, og kanska tað kundi verið skipað í samband við 100 ára dagin hjá Tórshavnar kommunu. Eitt annað, eg havi hugsað um, er at skipa fyri einum fyrilestri við rektaranum á skúlanum hjá mær, ætlaðum føroyskum sjónleikarum, sigur Kjartan Hansen.

Í øllum førum skal peningurin nýtast til viðkomandi listagrein.

Kjartan Hansen gongur sum nevnt í skúla í Luleå í Norðursvøríki. Skúlin tekur inn næmingar annaðhvørt ár, og var hann millum teir 600 sjónleikararnar, ið søktu um upptøku fyri tveimum árum síðan, har av bert átta sluppu gjøgnum nálareygað. Skúlin er framúr góður, og fáa tey frálæru á høgum støði á skúlanum, greiðir hann frá.

– Eg verið so liðugur í 2010, og tá kundi eg hugsað mær at verið verandi í Svøríki, og arbeitt við sjónleikinum. Av tí at eg tosi danskt, kundi tað verið upplagt at arbeitt tvørturum markið millum Danmark og Svøríki, og møguliga at skapa arbeiði fyri onnur. Mítt mál er ikki at gerast kendur, men eg vil sleppa at gera tað, sum eg tími, sigur Kjartan Hansen.